# Prísurin hækkaður 15 kr. seinastu tvey árini

*Prísurin á saltfiski eru sera høgir og tað er onki sum bendir á, at prísurin fer at lække aftur enn*

ÁKI BERTHOLDSEN



Prísurin á saltfiski eru farnir einar 15 krónur upp bara hesi seinastu tvey árini. Og tað er onki, sum bendir á, at hann fer niður aftur enn.

Eisini Rói Egholm, stjóri á fiskasøluni Farex staðfestir, at prísurin á føroyskum saltfiski er so høgur sum ongantíð fyrr.

Í seinastuni hevur verið eitt sindur av kjaki um prísirnar á saltfiski og ikki minst hevur tað vakt ans í Noregi, at vit fáa so góðan prís fyri okkara saltfisk.

Eitt nú hevur stjórin á Fiskasøluni greitt frá, at vit fáa upp til yvir 70 krónur fyri saltað toskafløk og tað ger, at at allur stórur toskur verður tikin at salta.

Hetta hava norðmenn uppfatað sum um vit fáa yvir 70 krónur fyri saltfisk yvirhøvur og tað trúgva teir onki uppá, tí sjálvir fáa teir ikki meiri enn gott helvtina.

Í Fiskaren fríggjadagin siga teir, at teir kunnu góðtaka ein prísmun uppá einar 8-10 krónur fyri kilo, tí tann føroyski fiskurin er betri enn tann norski.

Stjórin á Fiskasøluni var ikki at hitta í gjáramorgunin.

Men á eini aðrari fiskasølu, Farex, sigur Rói Egholm, at tað er ein misskiljing um tað er fatað so, at vit fáa yvir 70 krónur fyri kilo yvirhøvur.

Tann saltfiskurin, sum kann koma upp um 70 krónur fyri kilo, eru bara tey størstu fløkini.

Og nøgdirnar av tí eru so smáar, at tað kann ikki brúkast sum miðalprísur.

Tó ásannar hann, at prísurin á saltfiski er sera høgur.

Men tað er stórur munur á flaktum fiski og á fløkum.

– Á góðum, flaktum fiski er miðalprísurin til fiskavirkini einar 40 krónur fyri kilo.

Á fløkum er miðalprísurin á umleið 60 krónur fyri kilo.

Og tað er avbera góður prísur.

### Okkara marknaður er sterkari

Rói Egholm sigur, at tað skerst ikki burtur, at miðalprísurin á føroyskum fiski er betri enn á tí norska.

Vanliga er prísmunurin einar 4-5 krónur, sum vit fáa meiri fyri saltfiskin enn norðmenn fáa.

Og í løtuni er prísmunurin enn størri enn vanligt.

– Hetta kemst av, at vit hava ein fisk, sum er betri.

– Vit hava eina vøru, sum er sera væl hóskandi til tann spanska marknaðin. Og júst tann spanski marknaðurin er ógvuliga sterkur í løtuni.

– Hinvegin hava norðmenn arbeitt meiri á portugisiska marknaðinum, sum er heldur veikari í løtuni.

Hetta ger, at í løtuni fáa vit einar 7-8 krónur meiri fyri kilo.

– Hevði tað verið øvugt, at okkara marknaður var tann veikari, og teirra tann sterkari, var kanska lítil og ongin prísmunur á føroyskum og norskum saltfiski.

– So í løtuni er støðan eitt sindur serlig, leggur Rói Egholm afturat.

### Føroyski fiskurin betri

Hann sigur, at okkara fiskur er tann betri fiskurin til tann spanska marknaðin.

– Okkara saltfiskur er hvítari, tjúkkari og treystari.

– Men vit skulu heldur ikki gloyma, at okkara fiskur hevur tann fyrimun framum tann norska, at tað er nógv betri fiti ímillum skræðuna og sjálvan fiskin.

– Tað ger fiskin nógv betri at gera sós útá. Og tað er er nakað, sum hóvar spaniólum, tí sós er júst nakað, sum teir leggja stóran dent á.

Men hann leggur afturat at vit skulu heldur ikki gloyma, at hesi seinastu árini eru føroyingar eisini blivnir nógv kringrari at salta fisk enn vit hava verið og tað ger sjálvandi eisini sítt.

– Tað kemur fyri ein part av, at vit eru farin at seta seta krøv til rávøruna og at keypa tann góðan fiskin at salta. Áður hava vit, grovt sagt, bara salta tað, sum ikki kundi brúkast til nakað annað.

– Harafturat hava vit fingið virki, sum burturav arbeiða saltfisk.

– Tað ger, at arbeiðsfólkið verður nógv kønari, og tað sæst aftur á úrslitinum.

### Útlitin óviss

Rói Egholm sigur, at tað er ilt at spáa um framtíðina.

Men útboðið av fiski er nógv minkað og tað skumpar undir prísin.

Hann sigur, at hetta til páskir eru onki sum bendir á, at prísurin fer at fella aftur.

Beint í løtuni er marknaðurin eitt sindur slakur, men tað er vanligt í januar mánaða og kann ikki takast sum ein ábending um gongdina framyvir. Og til páskir er onki sum bendir á, at prísurin fer at fella.

– Spurningurin er meiri so, hvat fer at henda eftir páskir.

– Tí aftaná, at prísirnir hava verið sera høgir ein vetur sum nú, hava vit viðhvørt sæð, at marknaðurin leggur heilt stilt um summarið og tað kann blíva púra deytt fyri saltfisk.

Hetta kemur av, at tá ið prísirnir eru so høgir sum teir eru, hava teir, sum keypa saltfiskin lítlan og ongan vinning og tí vilja teir ikki keypa innundir seg til næsta vetur.

Tað hava teir annars gjørt viðhvørt onnur ár, tá ið prísirnir hava verið lægri hesa tíðina.

Og tað kann so eisini koma at ávirka avreiðingarprísin á toski í Føroyum, sigur Rói Egholm

# Fiskaðu 274.000 tons undir Føroyum

*– Útlendsk skip fiskaðu stívliga 274.000 tons undir Føroyum í fjør. Russarar fiskaðu nógv mest*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Londini uttanfyri ES fiska nógv meiri undir Føroyum, enn ES londini gera*

Útlendsk skip fiskaðu 274.006,5 tons undir Føroyum í fjør.

Hetta vísir ein uppgerð yvir tað, sum útlendsk skip fiskaðu undir Føroyum í fjør.

Uppgerðin vísir, at tilsamans fiskaðu skip úr átta fremmandum londum undir Føroyum í fjør og tilsamans høvdu tey 6.049 fiskidagar.

Nógv tað mesta, sum tey útlendsku skipini fiska undir Føroyum, er svartkjaftur.

Tilsamans fiskaðu tey 218.802,9 tons av svartkjafti undir Føroyum í fjør.

Men tey fiskaðu eisini 15.574 tons av makreli, 2.482, 54 tons av av longu, 1.958,6 tons av sild, 1.949,8 tons av langasporli, 1.593,9 tons av brosmu, 1.060,6 tons av blálongu, 788,1 tons av toski, 628,9 tons av hýsu, 640 tons av upsa, 178,7 tons av kongafiski, 92 tons av stinglaksi, 87,8 tons av svartkalva, 62,3 tons av havtasku, 50,65 tons av kalva, sjey tons av rossamakreli og 1.047,84 tons av øðrum fiskasløgum

### Russarar fiska mest

Ikki óvæntað eru tað russisk skip, sum hava fiskað nógv mest undir Føroyum.

Russisk skip fiskaðu tilsamans 129.083,3 tons undir Føroyum í fjør og tað brúktu teir 2.629 fiskidagar til.

Nógv tað mesta, sum russarar fiska er eyðvitað svartkjaftur, teir fiskaðu 116.525,9 tons av svartkjafti undir Føroyum í fjør.

Annars fiskaðu teir 11.608 tons av makreli, 7 tons av rossamakreli, 3,1 tons av upsa og 84,7 tons av øðrum fiskasløgum.

Næstmest hava íslendsk skip fiskað undir Føroyum í fjør.

Íslendingar fiskaðu 54.092 tons undir Føroyum í fjør.

Og sigast kann ikki annað enn at íslendingar fiskað reint, tí teir fiskaðu 54.062 tons av svartkjafti og 30 tons av makreli.

Til tað brúktu teir 519 fiskidagar.

Triðmest hava norsk skip fiskað undir Føroyum, tey fiskaðu 44.287,8 tons undir Føroyum í fjør.

Eisini tey norsku skipini fiskaðu mest svartkjaft undir Føroyum, 39.180 tons.

Men tey fiskaðu eisini 2.344,2 tons av longu, 1.535,7 tons av brosmu, 487, 4 tons av toski, 379,8 tons av hysu 85 tons av blálongu, 76,9 tons av upsa umframt smávegis av øðrum fisksasløgum.

Norðmenn brúktu 1.618 fiskidagar undir Føroyum í fjør.

Annars er tað meiri smátt , tað sum hini seks londini hava fiskað undir Føroyum.

Uttanfyri ES, eru tað bara grønlendsk skip afturat, sum hava fiskað undir Føroyum í fjør, tey fingu 140,3 tons tilsamans. Grønlendingar fingu 48,7 tons av longu, 39,6 tons av brosmu, 30 tons av hýsu, 17,6 tons av toski, 900 kilo av upsa og 3,5 tons av øðrum fiskasløgum. Og til alt tað brúktu grønlendingar 60 fiskidagar.

ES londini fiskaðu tilsamans 19.403,05 tons undir Føroyum í 1.223 fiskidagar.

Mest fiskaðu donsk skip, sum fiskaðu 8.125 tons undir Føroyum í fjør. Donsk skip fiskaðu 3.936 tons av makreli, 3.085 tons av svartkjafti og 1.104 tons av sild.

Til tað brúktu teir 90 fiskidagar.

Næstmest fiskaðu Bretsk skip, sum fingu 7.206,7 tons í 463 dagar.

Bretsku skipini fiskaðu 5.950 tons av svartkjafti, 433,02 tons av upsa, 185,8 tons av av hýsu og 248 tons av toski, 29,4 tons av blálongu, 24,5 tons av kongafiski og tilsamans gott 160 tons av øllum møguligum øðrum. Bretar brúktu 463 fiskidagar undir Føroyum í fjør.

Harumframt fiskaðu fronsk skip 3.859,75 tons undir Føroyumí 629 dagar.

Tey fingu 1.918,8 tons av langasporli, 945,4 tons av blálongu, 85,5 tons av stinglaksi10,3 tons av upsa og nøkur heilt fá tons, sum teljast á finrunum av øðrum fiskasløgum.

Annars fiskaðu týsk skip 211,6 tons undir Føroyum í 41 dagar.

Týskarar fiskaðu 116,6 tons av upsa, 33,7 tons av toski, 33,3 tons av hýsu og annars nøkur heilt fá tons av øðrum fiski.







*Ein rúgva av fólki var komið saman á bryggjuni tá tey bæði »nýggjastu« skipini í føroyska flotanum á fyrsta sinni aftur løgdu at føroyskum keikanti, og sum vera mann, nýtti bygdarráðsformaðurin í Vestmanna, Gunn Jacobsen, eisini høvið til at bjóða skipunum vælkomin til bygdar*

**Myndir: Jens Kristian Vang**

# Klettarnir afturkomnir

*Leygardagin stevndu »Klettarnir« báðir inn á Vestmanna, har teir nú hoyra heima. P/F Meðalsbrekka hevur keypt trolararnar úr Ný Sælandi, hagar teir vórðu seldir í 1994. Skipini hava fingið nýggj nøvn og eita nú Fram og Vestmenningur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Bryggjan í Vestmanna var stúgvandi full av fólki leygardagin, tá nýggju skipini í flotanum stevndu inn á vágna.

Nýggj eru tey ikki meiri enn so, at tey eru bygd í 1989, og nýggj í flotanum eru tey heldur ikki meiri enn so, at tey hava verið her fyrr. Tá vóru nøvnini Stígarklettur og Hádegisklettur, so talan er um kend skip, tá til stykkis kemur.

– Men hvør er hvør, veti eg ikki, sigur nýggi reiðarin, sum er í góðum hýri.

Sama ger, tí hann fær ikki brúk fyri tí heldur, tí skipini hava fingið nýggj nøvn og eita nú Fram og Vestmenningur.

### Endurnýgging

Sum sagt, so hava vestmenningar keypt nýggju úr Ný Sælandi.

Illa gekst í hond hjá dalbingum at fáa hjólini at mala og til seinast góvu teir skarvin yvir.

Trolararnir vóru seldir av landinum, eins og so nógvir aðrir vóru tað tá, og tað var ikki sørt, at tár vóru í eygunum á mongum sjómanni, tá skipini fóru.

Nú trolararnir aftur eru í Føroyum, spurdu vit reiðaran, Tummas Christophersen, um orsøkina til at teir hava keypt nýggj skip.

– Tað er fyri at endurnýggja okkum. Hini skipini vit hava eru vorðin í eldra lagið, so vit valdu at fara út at hyggja at nýggjari skipum og tá fullu eyguni á hesi bæði skipini, sigur Tummas.

*Hvørjum standi eru skipini í, nú tey koma aftur hendavegin?*

– Skipini eru í góðum standi. Annað teirra varð klassað í fyrraárið, meðan hitt varð klassað í fjør, so tey eru í fínasta standi nú tey koma, sigur reiðarin.

### 25 mió. fyri bæði

Tá nýggj skip koma í flotan, er kostnaðurin áhugaverdur. Tí spurdu vit reiðaran hvat skipini kostaðu.

– Vit hava keypt fyri 25 mió. krónur - fyri bæði, sigur hann, og leggur afturat, at hann heldur at tað er á eini góðari leið. – Skipini eru ikki nýggj, men tey eru í góðum standi, og tí halda vit, at tað er á eini leið.

Fíggingin er føroysk øll sum hon er, og er tað Realurin, sum hevur fíggjað alt sum er omanfyri eginfíggingina.

Hvussu stórur partur er eginfígging og hvussu stórur partur er fremmand fígging vil reiðarin ikki út við, men vit skilja, at eginfíggingin er rímuliga stórur partur av kostnaðinum.

Tummas Christophersen metir at bátarnir fara at veiða eini 14 til 1500 tons um árið, og við tí metir hann tað fer at mala væl og virðiliga runt.

– Sjálvandi ber illa til at siga, hvussu nógv bátarnir fara at selja fyri, tí tað veldst um prísin, men fáa vit á leið tað, sum bátar í hasi støddini, so er ikki tann stóri vandin, sigur hann.

Hesir bæði skipini skulu fiska upp á loyvini hjá Vesturtúgvuni, Mars og Froyi, sigur reiðarin.

*Verður talan um partroling ella skulu skipini royna hvør sær?*

– Tey fara at partrola. Tað loysir seg nógv betri at partrola tí nýtslan av eitt nú olju er so nógva ferðir minni enn hon annars hevði verið, og harafturat verður bara ta eina trolið brúkt, so tann nýtslan verður eisini minni, sigur Tummas Christophersen, sum leggur afturat, at skipini fara at avreiða har tey fáa mest fyri fiskin.

– Vit hava ikki bundið okkum til nakað virkið, og tað munnu tey fægstu skipini gera í dag, sigur hann.

Tað vera sjey mans við hvørjum skipi hvønn túrin, men einir 3 ella 4 aðrir mans verða eisini knýttir at skipinum, tí manningin verður umborð tveir túrar og vera síðani ein heima.

### 58 dagar í sjónum

Sum nevnt eru skipini keypt úr Ný Sælandi, og við at hyggja á ein »globus« sæst, at tú sleppur vallað longur burtur frá Føroyum enn júst til Ný Sælands.

Tí var eisini talan um eina sera drúgva heimferð.

Tá skipini stevndu inn á Vestmanna leygardagin høvdu tey verið á ferð í samfullar 57 dagar.

Tey stevndu út av Ný Sælandi tann 13. november í fjør, og tá varð kósin sett móti Føroyum.

Sum vera mann, ber illa til at sigla allan teinin í einum, tí so stór er oljugoymslan umborð ikki, so lagt varð inn í trimum støðum á ferðini.

– Fyrstu ferð vit løgdu inn, var á Tahiti. Haðani hildu vit leiðina fram til Panama og haðani víðari til Azorurnar, sum var seinasta staðið vit steðgaðu, sigur reiðarin, sum sjálvur var við á ferðini heim.

Og veðrið á ferðini var stak gott sigur hann. Summar er hinumegin knøttin nú, og tí hava manningarnar fingið nógva sól ávegis til Føroya.

– Vit høvdu ein fínan túr í besta veðri, og tað var ikki fyrr enn vit nærkaðust Føroyum, at vit merktu stormarnar, sigur Tummas Christophersen, reiðari at enda.

Nýggju trolararnir fara til fiskiskap í næstu viku.

Sosialurin ynskir eigarum og manning hjartaliga tillukku við nýggju skipunum og góða eydnu frameftir.

